# Ítrivsvegleiðari til eldrasambýlið á Skála

Søkt verður eftir ítrivsvegleiðara til búfólkini á Eldrasambýlinum á Skála

Arbeiðið hjá ítrivsvegleiðaranum er, við støði í áhuganum og førleikanum hjá búfólkunum, skipað fyri stimbrandi aktivitetum saman við búfólkum og starvsfólki.

Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna og er tíðaravmarkað frá 15. september til 31. desember 2005. Møguleiki er fyri, at starvið heldur áfram komandi ár.

Ynskiligt er at tann, ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu sendast Runavíkar kommunu í seinasta lagi mánadagin 12. september 2005.

**Runavíkar kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
600 Saltangará

# Leiðari

## til dagrøktarskipanirnar í Hvannasundi og á Viðareiði

Hvannasunds- og Viðareiðis Kommuna søkja eftir leiðara fulla tíð til dagrøktarskipanirnar í báðum kommununum.

Umsøkjarin skal hava námsfrøðisliga útbúgving sambært løgtingslóg nr. 65 frá 10.05.2000.

Starvið verður sett frá 1. oktober 2005.

Løn sambært sáttmála ímillum Pedagogfelag Føroya og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum viðmælum vera at senda til:

**Hvannasunds Kommunu**
**FO-740 Hvannasund**

í seinasta lagi 20. september 2005.

Meira fæst at vita frá núverandi leiðara á tlf. +298 211341 ella við at venda sær til kommunurnar.

| **Hvannasunds Kommuna** | **Viðareiðis Kommuna** |
|---|---|
| FO-740 Hvannasund | FO-750 Viðareiði |
| Tlf. +298 452007 | Tlf. +298 451083 |
| Fax +298 452007 | Fax +298 451094 |
| t-post: hvanna@olivant.post.fo | vid.kommuna-kallnet.fo |

Dagrøktarskipanin á Viðareiði hevur 8 ár á baki, og er í dag nominerað til 30 børn, 5 dagrøktarar eru í skipanini. Skipanin hevur eina spælistovu við spæliøki rundanum, har dagrøktarar og børn kunnu koma saman.

Skipanin í Hvannasunds Kommunu er nominerað til 30 børn. 5 dagrøktarar eru í skipanini. Skipanin í Hvannasundi hevur nýggja spælistovu við øki rundanum til frama fyri dagrøktarar og børnini í skipanini.

# DANSISKEIÐ



*Nu kvøldini gerast longri,*
*verður aftur farið at svinga...*
*....um nóg nógv tekna seg,*
*skipar Dansifrøi fyri dansiskeiði í*
*aulini í studentaskúlanum í Hoydølum.*

Bólkarnir verða hesir:

**Týskvøld**

Bólkur 1: 19.00 til 20.00 Argentinskur tango
Dansileiðarar: Anne Lise og Mads A. Winther
Tilmelding á tlf.: 31 53 10

Bólkur 2: 20.30 til 21.30 Fólkad./dansispøl.
Blanda hold við livandi tónleiki
(*Kristian Blak, Hilmar Joensen og aðrir gestatónleikarar*)
Dansileiðari: Sharon Weiss
Tilmelding á tlf.: 31 48 15 / 21 71 19 ella til tutl@post.olivant.fo

**Hóskvøld**

Fólkadansir & Dansispøl
Bólkur 3: 19.00 til 20.00 Byrjarar
Bólkur 4: 20.00 til 21.00 Tey ið hava dansað 2 ár ella meira
Bólkur 5: 21.00 til 22.00 Tey ið hava dansað í fleiri ár
Dansileiðarar: Ruth og Jögvan Martin Mørk
Tilmelding á tlf.: 31 61 25 ella til jm0810v5.skulin.fo

Kostnaður fyri dansiskeiðið 2005/2006 er kr. 500,00 + limagjald.

Dansiskeiðið byrjar týskvøldið 20. september 2005 til 16. mars 2006. Áhugað verða biðin um at tekna seg sum skjótast. Gjaldast skal við fyrsta frálærutíman

Eins og undanfarnu ár skipar Dansifrøi fyri dansifrálæru í gomlum sum nýggjum dansum.

*Tað liggur nær at hugsa sær, at tað at dansa gamlar dansir er gamaldags.*

Men soleiðis munnu tey yvir 1500 fólkini, sum í eitt styttri ella longri tíðarskeið hava verið limir í dansifrøi, neyvan hava hugsað.

At dansa er stuttligt, at dansa er eisini ein góður máti at koma burtur frá tí dagliga arbeiðsresinum...

Dansifrøi er eisini annað enn dansur! Tann sosiala samveran er eisini ein týðandi partur av felagsskapinum.

**Dansifrøi**

## FORD TRANSIT 2.0 DIESEL



Km 44.630
Árg. 18.12.2002
Nývirði 225.000,-
Dagsvirði 163.000,-
Síðsta boð 100.000,-

Bjartur Brekkstein,
sýnsmaður

Set teg í samband við sýnsmannin á tlf. 345771 og 215771 ella bb@trygging.fo

Akfarið hevur ongan størri skaða, tað kann síggjast í garðinum hjá TF á Hálsi

## SAAB 9-5 2.0



Km 56.700
Árg. 28.11.2001
Nývirði 377.800,-
Dagsvirði 235.000,-
Síðsta boð 150.000,-

Bjartur Brekkstein,
sýnsmaður

Set teg í samband við sýnsmannin við telduposti ella á tel 345771 millum kl. 08.00 – 10.00

Akfarið kann síggjast í garðinum hjá TF á Hálsi

**Vitja eisini økið "Søla av bilum" á www.trygging.fo**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*

# Til Sølu



**Bayliner 2655**
**við fly bridge, VHF, radara og kortplottara,**
**Nýggjur Yanmar Diesel motorur 240 HK.**
**Prísuppskot: kr. 425.000,-**

**Tel 216 616**

# Sethús til sølu í Skopun

Sethús í Gerðinum í Skopun til sølu um hóskandi boð fæst.

**Nærri fæst at vita á tlf. 361767/211167 ella á tlf. 361061/220201**

## BILMEKANIKARI

VR-Bilar søkir eftir Bilmekanikara at byrja skjótast til ber.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv og royndir sum bilmekanikari. Umsøkjari skal eisini vera fyrikomandi og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Skriftlig umsókn skal sendast til

VR BILAR
VR-Bilar Sp/f
Hoyvíksvegur 61
Postsmoga 3130
FO-100 Tórshavn

Meir fast at vit við at venda sær til Jóhann Wolles á Telefon 322 110.

VR-Bilar er ein bilfyritøka í støðugari menning, sum selur persónbilar av merkinum Volvo og Renault, og fara nú eisini at selja Chevrolet, umframt Volvo Bussar og Lastbilar. Afturat bilasøluni eru 2 verkstøð. Eitt persónbila- og eitt lastbilaverkstað. Til at veita hesum tænastu er ein eykalutagoymsla. Á VR-Bilum starvast í løtuni 18 fólk, har av 12 á verkstøðunum.